# Góðu børn, nú koma vit til Havnar

## Leygardagin kl. 15 eru vit í Vágsbotni



Ja, nú líðir væl til jólaaftan, og vit eru klárir við øllum gávunum. Vit hava tosað við skiparan á jólaskipinum, og vit hava tosa við rossini í Marknagili, og øll eru blíð og vilja hjálpa okkum seinasta strekkið.

Men nú er veðrið so vánaligt, tað er nógvur vindur og hvirlur eru eisini. Og boðað verður eisini frá nógvum avfalli.

Eitt verri skil – men vit koma og vóna, at tit eisini koma oman í býin at heilsa uppá okkum, tí tað er tað stuttligasta hjá okkum jólamonnum er at heilsa uppá og tosa við bæði børn og vaksin. Tey vaksnu tosa so nógv um ringar tíðir, men tað vistu vit einki um , so vættrarnir hava kýtt seg, sum teir plaga, so gávur vera eisini í ár, og vit vóna at tykkum fara at dáma alt, sum gjørt er. Vit hoyrdu um ársins jólavættur, sum mundi forkomið gávunum til børnini á Argjum, men tibetur, at enda hjálptust teir allir, so nú kunnu eisini tey á Argjum gleða seg.

Og nú vit eru lidnir, hava vit góða tíð at mala í býnum og hugna okkum. Vit hava hoyrt, at har eru komin fleiri nýggj hús í jólabýnum í Tinghúsgarðinum, at har eru bæði børn og ung sum undirhalda, og at á Býarbókasavninum er ein barnateknikapping. Vit vera í býnum hvønn dag nú - eisini sunnudagin, so kanska skuldu vit farið og lúrt, meðan børnini tekna. Annars so kunnu vit lurta eftir tónleikinum, og svangir nýtist okkum ikki at vera, tí har er altíð onkur, sum selur okkurt gott í býnum. Kanska er tað mest køkur og vaflur í jólabýnum, men tá bilar ikki, um man etur eina kaku ov nógv.

Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og vit síggjast!

















